**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Kongafiskur. Túrur nr. 0702.**
**Tíðarskeið: 24/1 - 29/1 – 2007.**

**Fólk við frá Fiskirannsóknarstovuni:** Mourits Mohr Joensen og Hallur Joensen

**Ábyrgd:** Jákup Reinert (kanningarleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum, var at fáa 200 trantkongafiskar (*Sebastes mentella*) eystanfyri Føroyar, og aðrar 200 millum Føroyabanka og Ytrabanka, til DNA kanningar.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper grunnur, breitlar 120 m og Injector doors (vágshuðrar).

**Um túrin:**
Fóru av Havnini 24/1 kl. 22.00. Vit byrjaðu Eystanfyri, har vit brúktu fýra tóv um at fáa 200 trantkongafiskar. Fóru suður millum bankarnar, har var sera lítið av kongafiski, høvdu 5 tóv, og fingu bert 58 trantkongafiskar, vóru á Havnini mánamorgun 29/1 kl 07.00.

**Prøvatøka:** Allir trantkongafiskarnir vórðu mátaðir, vigaðir, kynjaðir og nytrur vórðu tiknar. Síðan varð tikin ein flís av aftastu bleytu fjøðurini á rygginum, til DNA kanningar.